## VOX-konsert leygardagin

Í ár eru 10 ár liðin síðani gospelkórið VOX byrjaði at syngja. Hetta ætla tey í kórinum ikki at lata fara aftur við borðinum uttan markering. Tí verður skipað fyri forvitnisligari konsert í Norðurlandahúsinum leygardagin. Ætlanin er at skipa konsertina í trimum pørtum: Einum við verandi sangarum, einum við sangarum sum hava sungið við kórinum áður og at enda syngur tað stóra felagskórið við teimum 50 sangarunum. Onkur av ungu sangarunum hevur verið kórinum øll 10 árini. Konsertin byrjar klokkan 16.



## Sunbeam sum vaktarskip

Hóast oljuprísurin seinastu tíðina er lækkaður nakað, so hevur stórur partur av fiskiflotanum ligið í longri tíð, tí tað loysir seg illani at fara til fiskiskap. Sum ein avleiðing av støðuni, hava vágbingar, saman við útlendingum, stovnað felagið Orka Offshore, sum hevur til endamáls at bjóða føroysk skip sum vaktarskip í oljuvinnuni, skrivar Suðurrás. Fyri umleið 3-4 vikum síðani fór Nesborg, sum higartil hevur partrolað saman við Bliki, til Danmarkar, har skipið síðani er gjørt klárt til oljuvinnuna, nú tað skal virka sum vaktarskip. Farna vikuskiftið fór skipið Sunbeam (myndin), sum skuldi fara til fiskiskap í staðin fyri Roc Amadour, eisini somu leið til Danmark, har skipið skal virka innan oljuvinnuna. Í farnu viku segði John Henrik Holm, stjóri í Orka Offshore, við Vinnuvitan, at møguleiki verður hjá føroyskum skipaeigarum at leiga skip við ella uttan manning út gjøgnum Orka Offshore.

# Gamli skúlin aftur til heiður og tónleik

**Ein av fyrstu døgunum verður byrjað at grava út fyri nýggjum musikkskúla í Sørvági. Hesin verður bygdur í og uppí 123 ára gamla bygdarskúlan.**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sørvágur:** - Vit vilja í øllum førum gera okkara til, at tónleikurin fær bestu umstøður at virka undir her í bygdini, sigur borgarstjórin, Jákup Suni Lauritsen við Sosialin.

Hetta er helst ein veruleiki sum tey tónleikahugaðu í Sørvági munnu fegnast um og hava longst eftir.

Í løtuni er støðan hon, at Musikkskúlin húsast í ymiskum hølum í skúlanum í bygdini. Men nú skal altso ein broyting koma í.

Ætlanin er at byggja ein sera snotuligan musikkskúla, sum fer at geva tónleikinum tær allarbestu umstøðurnar í framtíðini.

Sambært verkætlanini skal tann gamli skúlin brúkast til endamálið, eins og ein annar bygningurin skal byggjast fastur í henda.

### Gávu

Sum nevnt, er nú klárt at fara undir at grava út fyri útbygninginum. Væntandi fer kostnaðurin av verkætlanini at kosta umleið 2,4 mió krónur.

Sum skilst á fólki, má hetta helst metast sum eitt eindømi, at ein kommuna í slíkari støðd gevur tónleikinum í bygdini so góðar umstøður at húsast undir.

Ein nevnd hevur arbeitt við hesi skúlaætlanini, í tøttum samstarvi við arkitektin Jákup á Stongunum.

Sambært borgarstjóranum er ein komin til eitt sera gott úrslit.

- Ætlanin er, at skúlin skal kunna takast í nýtslu komandi ár, sigur Jákup Suni Lauritsen.

Nevnast kann, at í fjør lat kommunan eina rættiliga stóra upphædd til Sørvágs Tónleikarafelag at keypa útgerð fyri.

Hetta hendi í sambandi við, at fimmti ár vóru liðin síðani felagið varð stovnað.



*Musikkskúlin í Sørvági er ein spennandi samanrenning av gomlum og nýggjum byggisniði*

# Átta prosent meiri í skatti

**Skattainntøkan í Vestmanna kommunu er økt munandi higartil í ár.**

KOMMUNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vestmanna:** Fyrra hálvár í fjør var hon 17,2 mió krónur, meðan hon í ár er komin uppá 18,6 milliónir. Hækkingin er sostatt omanfyri 8 prosent.

Í fíggjarætlanini fyri 2008 metti kommunan, at skattainntøkuna fór at verða 35,5 mió krónur.

Talan var um eina sera varisliga meting, tí skattainntøkan í 2007 gjørdist 35,8 milliónir.

- Um vit gera framrokning fyri 2008 við støði í farna ári, so kunnu vit vænta, at skattainntøkan í ár verður um 38,7 milliónir. Hetta eru 3,2 milliónir meiri enn mett er í fíggjarætlanini, verður sagt úr kommununi.



*Skattainntøkan er vaksandi í Vestmanna*

# List við antimonologum

Leygardagin 30. august letur upp ein framsýning við norska listamálaranum Håkon Gullvåg í Listasavninum. Hann verður sjálvur hjástaddur við ferniseringina.

Heitið á framsýningini er Anti-monologar, og fevnir um 50 oljumálningar, ið listamálarin hevur lænt til framsýningina.

Tað verður Allis Helleland, sum er stjóri á Nasjonalmuseet for Kunst, Arkitektur og Design í Oslo sum setir framsýningina.

Håkon Gullvåg hevur í meiri enn 30 ár havt eina serstøðu í listarliga umhvørvinum í Noregi. Og henda framsýningin er eisini dømi um trý av hansara týdningarmestu myndevnum – andlitsmyndum, stólum og kirkjulist.

Norski og føroysku listfrøðingurin, Eva Furseth hevur skrivað ein bók um listamannin, saman við rithøvundinum Jan Kjærstad.

Við ferniseringina verða bæði Håkon Gullvåg og Eva Furseth.

sb.



*Norski listamálarin Håkon Gullvåg hevur arbeitt nógv við figurativum myndamáli, har m.a. sterkir litir hava sína ávirkan*